Vinnan

VINNUTÍÐINDI í Sosialinum fast hvønn týsdag
– eisini aðrar dagar

# Formula International á veg út í Europa

**Við einari íløgu upp á eina trísifraða milliónaupphædd ætlar Formula International sær 15.000 kundar á europeiska marknaðinum, aftrat teimum 10.000 teir longu nú hava á danska marknaðinum**

KT-VINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara Egon Olsen, sum hevur eina ætlan. Tað hava Formula International og Torkil Holm Petersen nevniliga eisini. Og í mun til ætlanirnar hjá Olsen, vóna Formula International og Torkil Holm Petersen at ætlanir teirra lukkast. Og fram til nú, sær bara gott út.

- Tað er áleið hálvttriðja ár síðani arbeiðið við at fyrireika Formula International varð byrja. Fyrsta stigið í teimum ætlanunum er nú framt, og vit hava fingið fótin fastan í Danmark, sigur Torkil Holm Petersen.

Tað er eitt dóttirfelag hjá Formula International, Norriq A/S, sum eigur og rekur felagið í Danmark, ið nevnist Norriq Danmark.

Endamálið við Formula International og Norriq eru í fyrsta lagi at víðka um virkisgrundarlagið í Danmark, samstundis sum farið verður víðari út í Europa. Í øðrum lagi er málið at fáa 15.000 vinnukundar í Danmark og í aðrar mátar at gerast ein heilt týðandi leikari á altjóða liðnum fyri sølu av skipanum, við støði í kervinum hjá Microsoft. Í triðja lagi at útvega eitt týðandi kundagrundarlag til KT- skipanir hjá Formula. fo, Føroya Tele, og øðrum føroyskum KT- veitarum, og í fjóðra lagi at tryggja luttøku í væntaða vøkstrinum í Europa innan Microsoft Dynamics KT- skipanir. Sostatt er yvirendamálið at skapa bæði peningaligt avkast og virðisøkjing til íleggjararnar.



*Torkil Holm Petersen er stjóri í Formula International og nevndarformaður í Formula.fo*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri at fáa fótin fastan í Danmark, varð mett rættast at keypa seg inn á marknaðin, gjøgnum longu framman undan væl virkandi KT-fyritøkur.

Fyrsta stigið var at seta á stovn Formula International, og hetta varð gjørt fyri einum góðum ári síðani. Tá hevði verið arbeitt við teim veruligu ætlanunum í hálvtannað ár.

Í hesum tíðarskeiði arbeiddi eisini ein størri projektbólkur við at fyrireika uppkeyp av KT-fyritøkum í Danmark. Tað ræður um at vit finna tær røttu fyritøkurnar at keypa upp, og tað hugsi eg hevur eydnast, sigur Torkil Holm Petersen.

## Fótin fastan

- Tankin var alla tíðina at keypa upp væl virkandi KT-fyritøkur, og síðani menna, samskipa, og skapa fyritøkurnar til okkara tørv og ætlanir. Hetta merkti, t.d. at vit lutvíst hildu fast um tær leiðslur, ið framman undan vóru í fyritøkunum, sum vit keyptu, sigur Torkil Holm Petersen. Tríggjar KT-fyritøkur vóru nú keyptar, og eru tær síðani lagdar saman í eina fyri fyritøku, nevniliga KT-fyritøkuna, Norriq Danmark, í hevur 170 fólk í starvi.

- Okkara kundamálbólkur eru smáar og millumstórar fyritøkur, tað vil siga fyritøkur upp til gott 500 starvsfólk.

Norriq hevur verið á marknaðinum síðani fjør vár, og fyritøkan hevur nú gjørt sín fyrsta roknskap.

- Nú vil eg ikki beinleiðis avdúka, hvat roknskapartølini siga, men eg kann kortini siga so mikið, at roknskapurin er nøktandi og áleið tað, sum vit høvdu ætlað, sigur Torkil Holm Petersen.

Í eini framløgu hjá Formula International sæst, at Norriq higartil hevur megnað at fingið fleiri enn 10.000 av teimum ætlaðu 15.000 kundunum í Danmark, og at umsetningurin fyrsta árið hevur verið u.l. 200 milliónir krónur. Sostatt kann staðfestast, at fyritøkan hevur fingið fótin fastan í Danmark.

Og sambært stjóranum í Formula International, Torkil Holm Petersen, er ein av stóru orsøkunum hon, at tað hevur eydnast at funnið rætta mannin at standa á odda fyri Norriq.

- Vit hava fingið Bo Martinsen sum forstjóra í Norriq. Hann kemur frá einum starvi sum sølustjóri hjá Microsoft í Danmark, og kennir tí bæði produktir og marknað sera væl, sigur Torkil Holm Petersen.

## Fasa tvey

Við hesum kann sigast, at fasa eitt – at fáa fótin fastan á danska marknaðinum – er rokkin. Nú skal Norriq Danmark nýtast sum lopfjøl til fasu tvey, sum er at fara víðari út í Europa. Í fyrsta umfari Holland og Belgia, og síðani Týskaland og Ongland umframt kanska aðrar nærmarknaðir.

- Vit hava higartil lagt einar 150 milliónir í ætlanina í Danmark, og nú vit fara víðari út í Europa verður neyðugt við, í øllum førum, 300 milliónum aftrat, sigur Torkil Holm Petersen.

Íleggjararnir higartil, og teir sum eiga Formula International og Norriq, eru Føroya Tele, Eik Grunnurin, TF Holding, umframt Formula.fo. Arbeiðið við at útvega íleggjarar og fígging til fasu tvey, fer í gongd fyrsta dagin. Ætlanin er at lata hesa uppgávuna til ein føroyskan peningastovn, um hetta á nækran hátt ber til. Sum skilst, er komið mest sum undir land við hesi ætlan.

Um grundina til, at Formula International hevur valt at hyggja út um landoddarnar, sigur Torkil Holm Petersen, stjóri í Formula International, at skulu vit veruliga vinna pening í KT- vinnuni, og skal KT-vinna gerðast til týðandi vinnu hjá Føroyum, so er heima marknaðurin snøgt sagt ov lítil.

Arbeitt verður við einari langtíðarætlan sum miðar ímóti at børsskrásetaNorriq-fyritøkuna í 2012. Tá skal eisini ein ætlað fasa trý fremjast, og hon sigur, at fyritøkan tá skal finnast millum 20 teir størstu veitararnar av Microsoft loysnum á altjóða støði.

Higartil hevur alt gingið eftir ætlan, og tað er einki sum bendir á, at alt ikki eisini skal ganga sum eftir ánni við fasu tvey.

Undir øllum umstøðum er tað ikki hvønn dag, at ein føroysk fyritøka og føroyskir íleggjarar spreiða seg út í Europa, við íløgum í hundraðamillióna flokkinum, og er hetta nógv stórsta KT-ætlan Føroyinga nækrantíð.